## Viðavøkstur á gongubreyt

***Klippa runnagirðing, trø ella annan viðavøkstur.***

*Tað er umráðandi, at vøkstur ikki er til ónáðir fyri fótgangara og ferðslu, eins og tað eisini er týdningarmikið, at viðavøksturin ikki skuggar fyri gøtuljósini. Á gongubreytini hava tey, sum síggja illa, tey sum brúka koyristól og fólk til gongu við barnavogni, brúk fyri nokk av plássi. Vit vilja heita á teg sum eigari av ognini at klippa girðing, trø og runnar, sum standa fram við markinum til veg og gongubreyt.*

Gongubreyt og koyribreyt skal kunna brúkast í fullari breidd. Runnar og trø skulu klippast aftur til markið.
Hæddin yvir koyribreyt skal vera minst 4,00 m. Tó skal tann fría hæddin yvir koyribreytina eisini vera fyri tann fyrsta meturin inn yvir gongubreytina.
Tann fría hæddin yvir gongubreyt, súkklubreyt og vegjaðari skal vera minst 2,75 m.
Planturnar mugu ikki koma fyri gøtuljósini.

*Markið er vanliga bakkanturin á ravmagnskápum, gøtuljósum og vegaskeltum. Við klipping skal ein vera varigur við, at greinar vanliga eru tyngri, tá tær eru vátar.*



Dømi: Her er tað greinar-
nar, ið forða fyri ljósinum

**Lógargrundarlag:**

***Løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, § 53, stk 1.***

**PLANTING V.M. FERÐSLUNI TIL BÁGA**

**§ 53.** Trø, planting og kjarrgirðingar á ella við veg skulu vera stívd, sneidd ella snøggað, at tey eru ikki ferðsluni til bága ella bera uppfyri hjá vegfarandi, serstakliga í bugum og kjørbreytum. Tykist tað at vera so, kann politivaldið eftir samráð við viðkomandi kommunustýri treyta viðkomandi innan fyrisetta freist at gera sum fyrisett og, um so er, at treytin verður ikki hildin, sjálvt fáa tað sum tørvar gjørt fyri hansara rokning. Um so er, at politivaldið heldur ikki, at tílík treyt eigur at vera givin, sum kommunustýrið ynskir, ger landsstýrið av í málinum.

Hetta eru tær ásetingar Klaksvíkar Kommuna vil heita á okkara jarðeiðarar um at fylgja. Vinarliga klipp av trøum og runnum, so at tey ikki eru til ampa fyri vegin og tess brúkarar. *Sí tekning:*


1 m
1 m
4 m
2,75 m
2,75 m
Privat lendi
Gongubreyt/súkklubreyt
Koyribreyt
Vegjaðari
Privat lendi